UTTAN ÚR HEIMI

## Ónýtilig hús

Teir seinastu fýra mánaðarnar hevur eldur verið í trimum íbúðarhúsum í París, og tað hevur kostað 38 børnum og 10 vaksnum lívið.

Kortini hava teir fronsku politikararnir ikki tikið málið upp fyrr enn nú. Nicolas Sarkozy, innanríkisráðharri, segði í gjár, ikki færri enn 976 íbúðarhús í París eru ónýtilig, og hann mælti til, at øll húsini verða stongd eina ferð med alla. Men hann segði einki um, hvussu myndugleikarnir ætla at hýsa teimum, sum so verða heimleys. Sambært blaðnum Libération eru 80 prosent av teimum ónýtiligu húsunum í landnyrðingspartinum av París, sum eisini er tann fátæki parturin av franska høvuðsstaðnum.

At kalla øll, sum hava latið lív í eldsbrununum í París, vóru fátækir innflytarar úr ymsum afrikonskum londum, og Jacques Chirac, forseti, hevur sagt, at hvør einasti eldsbruni skal kannast til botns.

## Oljufelag lagt undir morð

Ein kirkjusamkoma í Sudan hevur lagt sak ímóti kanadiska oljufelangum Talisman Energy.

Kirkjufólkið vil vera við, at kanadiska felagið hevur skipað fyri einari langari røð av lógarbrotum í Sudan. Sambært ákæruritinum snýr tað seg um etniska útreinskan, morð, krígsbrotsverk, ognartøku, trælahald, burturflyting og neyðtøku. Sagt verður, at Talisman Energy samstarvaði við stjórnina í Sudan, og at felagið mælti stjórnini til at flyta fólk burtur úr økjum, sum felagið vildi sleppa at leita eftir olju í.

Kanada og USA hava roynt at forða fyri, at málið skuldi enda í rættinum, men Denise Cote, dómari, sigur, at málið verður viðgjørt. Hon sigur, at altjóða samfelagið hevur áhuga í, at tey, sum eru sek í fólkamorði og brotsverki ímóti mannaættini, verða revsað, og tí skal málið ganga sína gongd.

Talisman Energy gavst við sínum virksemi í Sudan fyri tveimum árum síðani.

## Hann fær ikki endurgjald

Í 22 ár sat Witton Dodge í einum fongsli í amerikanska statinum Florida fyri at hava neyðtikið eina kvinnu. Men herfyri prógvaðu DNA-kanningar, at tað var ikki hann, sum neyðtók kvinnuna.

Witton Dodge, sum upprunaliga varð dømdur lívlanga fongsulsrevsing, og sum nú er 43 ára gamal, varð latin leysur alt fyri eitt. Fleiri leiðandi politikarar í Florida bóðu hann um umbering samfelagsins vegna og lovaðu, at hann skuldi fáa endurgjald. Men so hendi ikki meiri.

Witton Dodge gjørdi tí av at leggja sak ímóti statinum við kravi um endurgjald fyri tey 22 árini aftan rimarnar. Dómurin fall mikudagin, tá dómarin William Gary kunngjørdi, at sambært lógini kann Witton Dodge ikki leggja sak ímóti statinum Florida, tí staturin er vardur ímóti slíkum endurgjaldskrøvum. Skal saksøkjarin hava endurgjald, mugu politikararnir taka stig til tess, segði dómarin.

## Dýrari enn Vietnam

Hvønn mánað kostar kríggið í Irak amerikonsku skattgjaldarunum 5,6 milliardir dollarar ella 33,6 milliardir krónur.

Tað er meiri, at kríggið í Vietnam kostaði. Umroknað til dagsins virði kostaði kríggið har amerikonsku skattgjaldarunum smáar 31 milliardir krónur um mánaðin í meðal tey átta árini, tað vardi.

Hetta sæst í einari frágreiðing, sum stovnarnir Policy Studies og Foreign Policy in Focus hava skrivað. Teir vísa kortini á, at samanborið við amerikonsku bruttotjóðarframleiðsluna var kríggið í Vietnam væl dýrari enn Irak-kríggið. Útreiðslurnar av Vietnam-krígnum svaraðu til 12 prosent av bruttotjóðarframleiðsluni, meðan tað tilsvarandi talið fyri kríggið í Irak er tvey prosent.

Vit kunnu leggja afturat, at Policy Studies og Foreign Policy in Focus eru ímóti krígnum í Irak.

# Tjóvar gera sær dælt av støðuni í New Orleans




*Hesir tjóvarnir høvdu stolið ein vøruvogn til tjóvagóðs, men løgreglan steðgaði teimum*

**Løgreglan noyddist í gjár at lata ymsar bjargingaruppgávur liggja, tí hon hevði nóg mikið við at forða tjóvum at ræna handlar og sethús**

NEW ORLEANS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gjáramorgunin noyddist løgregluleiðslan í Luisiana at senda umleið 1.500 løgreglumenn inn í miðbýin í New Orleans, tí tjóvar høvdu brotið inn í fleiri handlar, har teir tóku tað, sum framvegis hevði nakað virði.

- Tjóvarnir eru ikki bara í miðbýnum. Teir eru farnir at nærkast íbúðarøkjunum, hotellunum og sjúkrahúsunum, og vit mugu steðga teimum, áðrenn teir koma hagar, segði borgarstjórin í New Orleans, Ray Nagin, við AP.

Einastaðni í miðbýnum høvdu nakrir tjóvar fingið sær ein truck, sum teir brúktu til at bróta glasdyrnar á einum apoteki við. Tá teir komu útaftur, høvdu teir meiri, enn teir kundu bera, so ymsar apoteksvørur lógu og flutu í gøtunum.

Eina aðrastaðni høvdu tjóvar tikið ein vøruvogn, sum var á veg til eitt ellisheim við mati. Tá ellisheimið bað løgregluna senda ein annan bil við mati, jagstraðu tjóvarnir eisini tann bilin, sjálvt um løgreglan fylgdi honum.

Myndugleikarnir í Louisiana søgdu í gjár, at tað fer at taka minst ein mánað at fáa alt vatnið úr New Orleans, og at tað fara at ganga minst fýra mánaðir, áðrenn fólk kunnu venda heimaftur. Eisini er greitt, at tað fer at taka fleiri ár at byggja býin uppaftur.

- New Orleans verður ein spøkilsisbýur teir næstu mánaðarnar, segði ein talsmaður fyri myndugleikarnar.

# Ætla at kroysta forsetan frá

**Nógv bendir á, at sýriska stjórnin var uppií, tá ein fyrrverandi libanskur forsætisráðharri bleiv myrdur fyrr í ár. Tað kann koma sýriska forsetanum aftur um brekku**

MORÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 14. februar doyði fyrrverandi libanski forsætisráðharrin Rafik Hariri av einari sterkari bilbumbu í Libanon. Illgruni var alt fyri eitt um, at sýrisku myndugleikarnir høvdu samband við morðið, og nú skrivar ísraelska blaðið Yediot Ahronot, at illgrunin er staðfestur.

- Vit hava vissu fyri, at Bashar Assad, forseti, hevur blóðdálkaðar hendur, endurgevur blaðið eina amerikanska trygdarkeldu fyri at siga.

Morðið á Hariri elvdi til stórar mótmælisgongur í Libanon, og endin var, at Sýrialand tók sínar hermenn úr landinum. Síðani hava libansku myndugleikarnir kannað morðið, og fleiri leiðandi menn í fregnartænastuni og forsetahirðini hava verið til avhoyringar. Sambært Yediot Ahronot eru tað hesar avhoyringarnar, sum hava avdúkað, at sýriska leiðslan var við til at leggja morðið til rættis.

Keldur, sum hava sæð avhoyringartilfarið, siga við ísraelska blaðið, at dagarnir hjá Bashar Assad í sýriska forsetastólinum eru taldir. Keldurnar vilja vera við, at USA og Frakland fara at seta ymisk tiltøk í verk ímóti Sýrialandi, og at eftir amerikonsku ætlanini verða tiltøkini lagað so, at tey skulu noyða Assad at fara frá.

Aðrar keldur siga seg ivast í, at Assad fer at leggja frá sær, men tær ásanna, at avdúkingin um sýriska leiklutin í morðinum fer at skaka leiðsluna í Damaskus, og at hon harafturat fer at seta Sýrialand uttan fyri altjóða samfelagið. Spurningurin er so, hvørja ávirkan tað fær innanlands.